# Tórshavnar býráð er eitt vespureiður





*Feðgarnir báðir Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Eirikur Mortensen, vesputýnari, í ferð við at beina fyri vespunum, sum høvdu gjørt innrás í býráðssalin*

*Myndir: Bárður*

**Um middagsleitið mikudagin mátti Tórshavnar Býráð senda boð eftir vesputýnaranum, tí eitt vespureiður var í sjálvum býráðssalinum**

VESPUR

Ofta er rokaligt í Tórshavnar býráð, samgonga og andstøða stinga hvør annan við líkum og ólíkum. Tí hevði tað óivað ofta verið passandi at ringt eftir vesputýnaranum hjá kommununi í sambandi við býráðsfundirnar. Men tað var eitt annað slag av vespureiðri, sum hósdagin fekk borgarstjóran at ringja eftir serkønu vespuhjálpini: Ein vespudrotning hevði sett búgv í millum skins og hold í sjálvum býráðssalinum, og í reiðrinum búleikaðust fleiri túsund vespur.

Tað gekk ikki leingi, so hevði Eirikur vesputýnari, sum eisini er sonur borgarstjóran, beint fyri reiðrinum, soleiðis at fólk aftur kann ferðast á Vaglinum uttan at verða órógvað av stríputa flogkyktunum. Um hetta fer at hava friðarligari býráðsfundir við sær í komandi tíð, fer tíðin at vísa.

**el**

# Ferðslutrygd á Summarfestivalinum

**Ráðið fyri Ferðslutrygd luttekur á Summarfestivalinum í Klaksvík 2005 við Hvølvusi, Gølli og Súkklurásini. Eisini verður ein bilur sleptur úr 20 m. høgum krana**

TÍÐINDASKRIV

Á parkeringsøkinum við Norðoya Sparikassa fáa fólk møguleika at royna Hvølvus, Gøll og Súkklurásina. Opið verður fríggjadagin 5. august kl. 16 til 22 og leygardagin 6. august kl. 14 til 22.

Leygardagin 6. august kl. 13 verður serligt tiltak á nýggju útfyllingini í miðbýnum, har ein bilur verður sleptur úr 20 m. høgum krana. Ferðin hjá bilinum økist nógv í hesum fallinum og tí eisini rørsluorkan. Sum dømi kann nevnast, at í samanstoyti við 70 km/t. ger rørsluorkan, at vektin hjá einum barni, sum vigar 20 kilo, økist upp í sløk 2 tons. Eitt vaksið fólk, sum vigar 75 kg, fer upp í 4 tons!




Endamálið við tiltakinum er at sýna, hvussu ógvusliga náttúrukreftirnar eru, og harvið at undirstrika, hvussu umráðandi tað er at nýta trygdarbelti.

**Festivaltilboð í Heygabúðini**

| | | |
|---|---|---|
| Karat kaffi | 500 gr. | 24,95 |
| Sild í sløsum | 580 gr. | 21,95 |
| Egg | 10 stk., | 14,95 |
| Chips | 200 gr. | 14,95 |
| Kotelettir | pr. kg. | 49,00 |
| Gullkorn | pr. pk., | 19,95 |
| Sunkist | 10 x 3 stk. | 69,00 |
| Cowboykeks | pr. pk. | 14,95 |

Hvønn dag, nýggj knettir og frikadellufars og nýskorna kjøt- og rullupylsu.

Heygabúðin

Tlf. 455228

# Countrydansur á Hálsi

DANSUR

*Tíðindaskriv*

Aftur í ár skipar Stuðlafelagið hjá Argja Bóltfelag fyri tíð vælumtókta Countrydansinum í Ítróttarhøllini á Hálsi tann 24. september, sum verður eitt aftturvendandi tiltak í september á hvørjum ári.

Vit hava aftur í ár tríggir vælumtóktar Countrybólkar at spæla til dansin. Øll kenna tann vælumtókta Countrybólkin úr Klaksvík, ein sera vælumtóktur Countrybólkur, sum flestu føroyingar vilja sleppa at hoyra.

Tað næsta orkestrið er Twilight, sum til dansin í fjør yvirraskaði øll innan country, teir spældu heilt fantastiskt. Tað triðja orkestrið er Country Orkestrið, sum er manna við vælkendum tónleikarum í Føroyum, og sum vit eru vís í kemur sum eitt stór yvirraskilsi til okkara dans í ár.

Sum nakað nýtt og undirhaldandi hava vit í ár fingið okkum ein konfransje, og tað er tann vælkendi Ólavur Klakk úr Klaksvík, vanliga nevndur Ólavur Presley, sum nógv í Føroyum munnu kenna sum ein skemtingarsaman frásøgumann, og tað gleða vit okkum eisini til.

Til dansin verður okkurt at fáa til matna við føroyskum viðskera. Ymiskt innan country, so sum hattar, slips, hálsturriklæði og annað verða at fáa til keyps.

Høllina verður hugnað um, borð verða sett upp, so ein sum vil sleppa at sita og lurta eftir tí vælumtókta countrytónleikinum kann eisini hugna sær.

Í fjør vórðu 1200 atgongumerki seld, og tá var útselt, men vit kundu selt fleiri hundrað afturat, tí vilja vit heita á tykkum sum ætla at fáa eitt fantastiskt countrykvøld, um at ogna tykkum atgongumerki í góðari tíð.

Hjartaliga vælkomin til eitt ógloymandi countrykvøld í Ítróttarhøllini á Hálsi tann 24. september, sigur Stuðlafelagið hjá Argja Bóltfelag.